Ov dýrt at byggja skip:

# Charisma kostar 300 milliónir

Veitingarskipið Havila Charisma, ið P/F Havborg Supply Service leigar úr Noreg, er knøpp 26 túsund bruttoregistartons til støddar og kostaði 300 milliónir at byggja. Føroyska felagið metir tað vera ov dýrt at byggja slíkt skip í leitingarstøðinum

OLJUVINNA
*John Johannessen*

Tað er kostnaðarmikið at gera seg út til at vera við í einum oljuævintýri. Tí hevur føroyska veitingarfelagið P/F Havborg Supply í fyrstu atløgu gjørt av at leiga sína útgerð.

Veitingarskipið, Havila Charisma, sum fríggjakvøldið fyrstu ferð fór av Runavík út til føroyska boriøkið við vøru, kostaði heilar 300 milliónir at byggja.

Havborg Supply hevur gjørt samstarvsavtalu við norska reiðaríið Havila, ið millum annað inniber, at føroyska felagið rekur risastóra norska skipið.

– Slík veitingarskip eru so kostnaðarmikil, at tað er ikki hugsingur um at byggja sær eitt, meðan vit enn eru á leitingarstøði. Tí hava vit gjørt avtalu við Havila. Men kemur tað so langt, at olja verður funnin, og vit fáa ein langtíðarsáttmála, fara vit sjálvandi at hugsa um at keypa skip, sigur Hans Albert Hansen, dagligur leiðari hjá Havborg Supply Service.

## Avtalu við Statoil

Havborg Supply Service hevur gjørt fasta avtalu við Statoil, um at Havila Charisma skal vera í tænstu hjá Suvereign Explorer so leingi royndarboringin í Føroyskum øki varir. Skipið skal sostatt sigla í fastari rutu millum Runavík og boriðpallin. Roknað verður við, at tað fer at gera millum tveir og tríggjar túrar millum útgerðarhavnina og boripallin um vikuna.

Havila Charisma er væl egnað til uppgávuna. Tað hevur stórt dekk, ið ger, at tað kann flyta nógvar og stórar lutir út til boripallin. Eisini er tað útgjørt, so tað kann fáast við akkershandling, eins og tað kann virka sum bjargingarskip.

Havila Charisma er 73,6 metrar langt, 16,4 metrar breitt, tað stingur 6,9 metrar, tað er 25.900 bruttoregistartons til støddar, tað hevur eina maskinorku á knappar 17 túsund hestar og ábyrgdina av hesum velduga maskinarí hevur ein 26 ára gamal norskur skipari.




*Tað er kostnaðarmikil útgerð, ið verður nýtt í oljuvinnuni. Veitingarskipið, Havila Charisma, sum føroyska felagið, Havborg Supply Service, rekur, kostaði 300 milliónir at byggja*

*Mynd: John Johannessen*


8. - 19. august 2001

SETANIN
· **8. aug. Høllin í Norðurlandahúsinum**
Røður, kunngerð av stuttsøgukappingarvinnarunum og norðurlendsku fotokappingini, frumframførsla Sfærøyske Observationer, dokumentarfilmur eftir Teitur Á. Dahl o.a.

OPERA
· **Den jyske Opera**
framførir "Det forjættede Land" – barnaopera við evni úr Móses bókunum
8. aug. Vesturkirkjan í Tórshavn,
9. aug. Christianskirkjan í Klaksvík.

· **Írsk Opera** (Co-Opera Ireland):
Madama Butterfly
18. og 19. aug. kl. 19:30 Norðurlandahúsið

SJÓNLEIKUR
· **Eitur nakað land Week-end?**
eftir Jóannes Nielsen,
9., 10., 11., & 12.aug. Meiaríið, Tórshavn

· **Bólkurin Usenkev**
framførir leikmyndina Don Juan fra Tranhuset
8. aug. Atlantis, Klaksvik
9. aug. Mentanarhúsid, Fuglafjørður
10. aug. Tvøroyri
12. aug. Virkið, Sandur
13., 14. & 15. aug. Sjónleikarahúsið, Tórshavn

· **Einrøðuleikurin Van Gogh**
við Hans Tórgarð
13. aug. Høganes, Runavík
15. aug. Mentanarhúsid, Fuglafjørður
16. aug. Listaskálin, Tórshavn
18. aug. Atlantis, Klaksvík

MYNDLIST
· **Listaframsýning**
Ungir íslendskir listamálarar sýna fram
8.-19.aug. Listaskálin, Tórshavn

· **5 føroyskir grafikarar:**
Aase B. Olsen, Astrid Luihn, Marius Olsen, Jóna Rasmussen og Karstin O. Lamhauge sýna fram listarverk
8.-19.aug. Smiðjan í Lítluvík

· **Randi Martin**
listaframsýning
8.-19. aug. Gallerí Oyggin, Tvøroyri

FØROYSKUR DANSUR
· **Tøkum lætt skipar**
8. aug. Dansistovan í Norðurlandahúsinum

· **Dansinátt**
Klaksvíkar Dansifelag skipar fyri
12. aug. Skálin í Klaksvík

· **Føroya kvøld**
12. aug. Skálin í Klaksvík

TÓNLEIKUR & SANGUR
· **Kakophonia**
Trio við soxofon, hammon orgul og percussion – Benjamin Koppel, Anders Koppel, Jacob Andersen. Upplestur við Ulla Koppel
8. aug. Norðurlandahúsið í Tórshavn
9. aug. Atlantis í Klaksvík
11. aug. Losjan í Gøtu

· **Palle Mikkelborg**
og orkestur, norðurlendskur tónleikavinnari ár 2000, spælir trompet saman við orkestri
13. aug. Norðurlandahúsið
14. aug. Norðlýsið, Grottukonsert

· **Kathy Chiavola**
bluegrasssangari við orkestri úr Nashville, USA. Syngur saman við føroyska countrysangaranum Ragnar í Vík og dupultkvartettini í Ebenezer
14. aug. Mentanarhúsið, Fuglafjørður
15. aug. Norðurlandahúsið

· **Caput**
Íslendskt tónleikalið, framførir sinfonietta m.a. verk av føroyskum og íslendskum komponistum.
14. aug. Norðurlandahúsið

· **Erann DD, Chilly Friday og** Prix vinnarin **Clickhaze.**
Ungdómskonsert
8. aug. Ítróttarhøllin á Hálsi í Tórshavn

· **Chilly Friday, B&Z, FLUX**
Ungdómskonsert
11. aug. Mentanarhúsið, Fuglafjørður

· **Gluntarne**
Rúni Brattaberg, Føroyar og Bjørn Asker, Svøríki syngja Gluntarne eftir Gustav Wennerberg, pianistur Gustav Asplund.
8. aug. Runavík
9. aug. Norðurlandahúsið

· **Chilli Strong Pepper**
Skotskir tónleikarar
10., 11. & 12. aug. Café Natúr

TÓNLEIKUR & SANGUR
· **Eivør, Teitur, konsert**
10.aug. Norðurlandahúsið

· **Eivør konsert**
11. aug. Bygdahúsið, Skopun

· **Teitur konsert**
9.aug. Suðuroy.
12. aug. Mentanarhúsið, Fuglafjørður

· **Mpiri**
Kórsangur: føroyskur vokalbólkur, settur saman av 13 ungum útisetum
8. aug. Kirkjan, Húsavík.
9. aug. Kirkjan, Fuglafjørður.
10. aug. Kommunuskúlaaulan, Tórshavn

· **Bubbi Morthens**
Vísusangur við íslendska vísusangaranum Bubbi Morthens.
10. aug. Atlantis, Klaksvík saman við Vísumonnum úr Klaksvík
11. aug. Norðurlandahúsið

· **Vísukvøld við Rasmus Lyberth, Grønland**
16. aug. Klingran, Norðurlandahúsið

· **Sangløta við Kari Bremnes, Norge**
17. aug. Klingran, Norðurlandahúsið

· **Egill Ólafsson**
Ísland, sjónleikari, sangari, framførsla saman við kenda bandenone spælaranum Olivier Manoury
16. aug. Mentanarhúsið, Fuglafjørður
17. & 18.aug. Norðlýsið, Grottukonsert

· **Kingosangur**
11. aug. Kirkjan í Kirkjubø
Petra Iversen og Hans Iversen
12. aug. Kirkjan í Tjørnuvík
Tjørnuvíkingar
15. aug. gl. Kirkja, Norðragøta
Kári Sverrisson, Niels Midjord, Hans Jákup Hansen, Petur Jákup Eliasen

FILMUR
· **Dancer in the Dark**
eftir Lars von Trier

· **Sange fra 2. sal**
eftir svian Roy Andersson

· **Italiensk for begyndere**
eftir Lone Scherfig

· **Sangen for Martin**
eftir Bille August
8.-19.aug. Havnar Bio

YMIST
· **Moderna Design**
6 ungir, føroyskir designarar stilla út. Barbara í Gongini, Borgny Patursson, Annika Heinadóttir, Guðrun Ludvig, Elisa Heinesen, Edward Fuglø.
8. & 9. aug. Skálin, Klaksvík
10. aug. Vágoy.
12. aug. Gallerí Oyggin Tvøroyri
14., 15., 16., 17. & 19. aug. Listaskálin.

· **Bókmentaløta**
upplestur við skotska rithøvundanum Duncan McLean
11. aug. Klingran, Norðurlandahúsið

· **Íslendsk Ballett**
við Pars Pro Toto
Dansari: Lára Steffansdóttir
12. aug. Norðurlandahúsið

· **Heðin Brú 100 ár**
– framførsla:upplestur, tónleikur og sjónleikur.
17. aug. Sjónleikarhúsið, Tórshavn

· **Kristian Blak** (Keybord) og **Heðin Ziska Davidsen** (Guitar)
16. aug. Norðlýsið, Grottukonsert

Madama Butterfly

Stephanssons Hús

Stuðlar: Dimmalætting · Faroe Seafood · Føroya Tele · Atlantic Airways · Føroya Banki stuðlar operuna Madama Butterfly